# Blómubindari til Fípuna í SMS

## Vit sóknast eftir einum røskum fólki at arbeiða 20-25 tímar um vikuna

Tú kemur at røkja nógvar ymiskar arbeiðsuppgávur í gerandisdegnum, og kemur at hava samband við nógv fólk. Tú kemur at loysa arbeiðsuppgávurnar í tøttum samstarvi við leigaran, og kemur at verða sett/ur gjølliga inn í arbeiðið í gerandisdegnum.

**Vit vænta av tær:**
- At tú kanska hevur royndir frá líknandi arbeiði og kennir til starvsgreinina
- At tú ert skilagóð/ur og megnar at hava nógvar bóltar í luftini í senn
- At tú ert nærløgd/lagdur, ert røkin og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- At tú ert ágrýtin og trívist við at hava nógv jørn í eldinum

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt avbjóðandi og fjøltáttað starv
- Eitt sjálvstøðugt arbeiði har tú fært møguleika at royna teg sjálva/n fult út
- Eitt arbeiðspláss har hýrurin er góður og áhugin fyri arbeiðinum stórur
- Møguleika fyri fakligari menning
- Løn sambært avtalu
- Byrja verður eftir avtalu

**Um hetta er nakað fyri teg, send so eina umsókn til:**
Carsten Rodenberg
crt@sms.fo

MIKLAGARÐUR





Takk fyri at tit hjálpa, so at vit kunnu hjálpa!

## NORÐOYA BJARGINGARFELAG
ynskir tykkum øllum
ein góðan **Sjómannadag**

Norðoya Bjargingarfelag
Faroe Islands Search and Rescue


HAVSBRÚN

# Skráin fyri Føroya Sjómannadag 2010

**MIKUDAG 18. AUGUST**

**18.00 - 19.00** Fiskikapping fyri SJÓRÆNARAR á Kósabrúnni fyri bæði gentur og dreingir. Eftir fiskikappingina leggja SJÓRÆNARA-SKIP at bryggjuni har farið verður umborð. Síðani gongur leiðin út í Kalsoyarfjørð at tveita fløskupostar. Børn skulu verða í bjargingarvestum og regnklæðum og sminkaði sum sjórænarar. Síðani verður silgt inn á Vánna har VATNKRÍGGJ verður millum bátarnar. Øll - baði børn og vaksin, sum fara umborð á bátarnar kunnu roknað við at gerast plask vát og tí er gott at hava heit klæði við sær. Foreldur ella avvarandi skulu verða saman við børnunum. Tann stóri sjórænarakongurin mælir til at børnini gera seg út við vatnballónum, tí vanligar luftballónir kunnu ikki nýtast,- tær bresta ikki eins lætt tá tær verða kastaðar. Tilmelding til fiskikapping er í EIK Banka í Klaksvík og tey sum koma inn á gólvið fáa seðil til fløskupost og eina sproytu at brúka í vatnkrígginum. (Avmarkað nøgd av sproytum) Føroya Bjór kemur við fløskum sum eru at fáa á kósabrúnni meðan fiskikappingin er.

**HÓSDAGIN 19. AUGUST**

**17.00 - 19.00** Bátasavnið í Leirvík er opið

**FRÍGGJADAGIN 20. AUGUST:**

**17.00 - 19.00** Bátasavnið í Leirvík er opið

**LEYGARDAGIN 21. AUGUST:**

**09.00 – 19.00** Listaframsýningar og kaffistovurnar í egningarskúrðunum á Stongunum lata upp. Hugnalig samvera, opið hús í egningarskúrunum og framsýning av livandi fiskum og skeljadjórum á Stangabrúnni. Millum kl. 13.00 og 18.00 bjóðar Virkishúsið ókeypis kramarísar til børn og vaksin. Ísarnir fáast í egningarskúri á stongunum.

**09:00** Føroysku seglskipini hittast á Pollinum og seta segl. Eisini verður luttøka av gomlum føroyskum bátum við árum og seglum. Seglskipini koma á Klaksvík og leggja at bryggja á Stongunum. Jóhanna TG 326 – Norðlýsið – Anita – Fram - Sangur og tónleikur á skipadekki.

**10.00 – 12.30** Stórt kaffiborð á Stangabrúnni Micheal Cavanagh úr Greencastle í Írlandi syngur. Gunvá við Keldu, borgarstjóri, bjóðar vælkomin.(kl.10.30) Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, setur Føroya Sjómannadag. Hanus G. Jóhansen, syngur eina vísu. Steypahandan til bestu skip og bátar í Føroyum. Forkvinnan í løgtingsins vinnunevnd, Katrin Dahl Jakobsen, sigur nøkur orð og handar heiðurstekin. SkipalistaQuizzin - Innleiðandi umfar. Spurnakapping. Føroyameistarakapping í epla-flising (menn og kvinnur í øllum aldri)

**SKRÁ FYRI STÓRA PALL (LEYGARDAGIN 21. AUG.)**

**13.00** Stór móttøka fyri Livar Nysted og Leven Brown, sum við bátinum Atemis Investments settu heimsmet við at rógva tvørtur um Atlatnshavið. Livar og Leven koma rógvandi inn eftir Vánni og leggja at bryggju við stóra pallin. Har verður báturin drigin uppá land og Sjómannadagurin heiðrar Livari og Leven. Síðani verður høvið at síggja heimskenda bátin, Atemis Investments, sum verður sýndur fram saman við Dianu Victoriu og Rospiggen á bryggjuni. Høvi verður at heilsað upp á Livar Nysted og Leven Brown.

**13.55** Føroyameistarakapping – Trolbøting

**14.20** Heimsmeistarakapping – Trolbøting

**14.30** Togtogan millum skipsmanningar

**15.00** Skipalistaquizzin - Finalan

**16.00** Føroyameistarakapping – Vinda hespur upp í noða. Kappingin er fyri pør

**16.30** Føroyameistarakapping – Kasta lodd

**16.50** Føroyameistarakapping – Halda dregg

**17.40** Føroyameistarakapping – Kasta fanglínu.

**17.30** Føroyameistarakapping – Sjómanstak

**18.00** Føroyameistarakapping – Kelving

**18.30** Føroyameistarakapping - Agnskering

**19.00** Føroyameistarakapping í Egning

**20.30** Stór heiðurskonsert við Hanus G. Jóhansen í Badmintonhøllini. Eftir konsertina verður dansur við Showmenn.

**KAPPINGARBÁSAR (LEYGARDAGIN 21. AUG.)**

**13.30 - 18.00** Á økinum eru serligir kappingarbásar har fólk kunnu royna síni sjómannakynstur. FM í Ripping og FM at vinda upp á trolnál. Á økinum hjá KJØLUR og Kjølbro Heilsølu Føroyameistarakapping – Kassastabling Norðoya MC skipar fyri á økinum niðan fyri sløkkiliðsstøðina.

**FRAMSÝNIGAR OG TILTØK (LEYGARDAGIN 21. AUG.)**

**12.00- 18.00** Móttøka "opið hús/skip" umborð á Magnus Heinason, har greitt verður frá virkseminum umborð á Magnus Heinason. Víst verður m.a. hvussu úrslit verða fingið til vega. Ymiskt áhugavert verður sýnt fram, og kaffi og te verður at fáa í messuni.

**12.00 - 18.00** 50 ára dagur umborð á Klakki og Jákup B Føroya Sjómannadagur heiðrar línuskipini Klakkur og Jákup B í samband við at 50 ár eru ligin síðan skipini komu sum nýbygningar á Klaksvík. Síðani hava Klakkur og Jákup B verið álítandi arbeiðspláss býi og fólki at frama. Skipini hava serligt heiðurspláss á Stangabrúnni og øll eru hjartaliga vælkomin at vitjað umborð, har kaffi og køkur verða at fáa úr messuni. Kl. 15.00 verður stór felagsmynd tikin á bryggini framman fyri Klakk av øllum, sum hava silgt við Klakki. Kl. 15.30 verður stór felagsmynd tikin á bryggjuni framman fyri Jákup B av øllum, sum hava silgt við Jákup B.

**12.00 - 18.00** Framsýning av gomlum Benzinmotorum og gomlum páhangarum frá 1932 og fram til 50 ini í Timburhandlinum hjá BORG. Framsýning av føroyskt sniðgivnum bundnum pløggum

**12.00 – 18.00** Framsýning av føroyskt sniðgivnum bundnum pløggum í stóra tjaldinum. Norðoya Kunningarstova skipar fyri.

**13.30 - 17.00** Samsonar-Smiðjan hevur opið hús. Jarn verður smíða í gomlu essuni.

**12.00 – 18.00** Grindarakstur og grindadráp Foto-framsýning, sum Norðlýsið skipar fyri.

**14.00** Svimjufelagið ÆGIR skipar fyri svimjukapping tvørtur um Vánna. Tilmelding hjá ÆGIR. Fyrilestur umborð á bátinum hjá Ainu Cederblom Eyð Matras hevur frasøgu um Ainu Cederblom umborð á bátinum. (40 min.) Kl. 14.30, kl. 16.00 og kl. 18.00

**15.00** Bjargingarroynd hjá Norðoya Bjargingarfelag

**15.00** Grindamannafelagið vísir hvussu hvalir verða skornir upp. Frásøgmaður greiður frá baði á føroyskum og enskum. Tveir grindahvalir frá grind í Klaksvík verða skornir upp hjá Norðoya Bjargingarfelag

**12.30 - 18.00** Action á sjónum - Uppliving fyri lívið – baði fyri børn og vaksin á luftpútum, sum verða hálaðar aftaná skjóttgangandi báti.

**12.30 - 18.00** Action í luftini - Rennistrongur av brúgvarenda.

**12.30 - 18.00** Kajak-rógvarar skipa fyri rógving við jollum fyri børn og vaksin. Eisini vísa Kajak-rógvarar síni kynstur út fyri Stangabrúnni

**SUNNUDAGIN 22. AUGUST:**

**11.00** Sjómansgudstænasta í Christianskirkjuni

**16.00 - 18.00** Bátasavnið í Leirvík er opið